J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 30. mars 2006
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# F U N D A R F R Á S Ø G N

**frá býráðsfundi nr. 04/2006**

Ár 2006 tann 30. mars kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 24. mars 2006 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Jón Nolsøe Olsen
Petur Abrahamsen

***Skrivari:*** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Áðrenn fundurin byrjaði spurdi borgarstjórin, um býráðslimir høvdu nakað ímóti at viðgerða tilmæli frá mentamálanevndini frá 30. mars 2006 um broytt uppskot til áskoðarapláss oman fyri leikvøllin í Fløtugerði. Hetta hevði eingin limur nakað ímóti, og varð hetta mál sostatt sett á dagskrá, sum mál nr. 18/2006.

## Mál nr. 14/2006.

**Eykajáttan í sambandi vi havnaútbygging á Enninum (oljuhavn).**

Fuglafjarðar býráð hevur á eykabýráðsfundi tann 02. mars 2006 eftir tilmæli frá einum minniluta í havnanevndini samtykt at byggja eina oljubryggju á Enninum fyri max. kostnað upp á kr. 12,5 mió.

Hesin peningur er ikki tøkur til endamálið, og mælir fíggjarnevndin á fundi tann 24. mars 2006 býráðnum til at heimila kommunalu fyrisitingini at taka upp samráðingar við fíggingarstovnarnar um lántøku upp á kr. 12,5 mió., og at heimila fyrisitingini at taka avgerð í málinum.

Eykajáttanin kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan við kr. 12,5 mió., og kemur sostatt at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2006 við nevndu upphædd.

Tá talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

**Avgerð:**

Tilmælið frá fíggjarnevndini varð samtykt við 6 atkv. Fyri og 3 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni, Tórfríður Abrahamsen og Petur Abrahamsen. Sostatt varð málið beint til 2. og endaligu viðgerð í býráðnum.

## Mál nr. 15/2006.

**Fyrispurningur frá Justinus Eidesgaard um kommunan hevur áhuga at keypa elstu sethúsini á Hellunum, sum hann er ánari av.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið e-post frá Justinus Eidesgaard, dagfestur 27. mei 2005 við fyrispurningi, um kommunan hevur áhuga at keypa elstu húsini á Hellunum, sum hann er ánari av.

Sjálvur hevur hann gjørt húsini í stand, so tey síggja snotulig út. Arbeiðið av at hava gjørt húsini í stand hevur sjálvandi kosta væl av peningi umleið kr. 470.000,00, umframt at hann hevur økt um grundstykkið, sum eisini kostar pening.

Umboð fyri mentamálanevndina og borgarstjórin vórðu boðin til Hellurnar tann 10. juni 2005 fyri at hyggja at húsunum, og har fekk hann sum eigari at vita frá umboðunum, at spurningurin fór at verða umrøddur í kommununi, so skjótt sum møguligt, og skuldu tygum fáa svar upp á fyrispurningin, tá tann viðgerðin varð liðug.

Nevnast skal, at umrødda mál hevur verið til viðgerðar áður í mentamálanevnd kommununar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini 20. juni 2005 og mælir nevndin býráðnum til at svara eigaranum, at kommunan ongan áhuga hevur í at keypa omanfyri nevndu ogn, grundað á at eingin peningur er avsettur á fíggjarætlan kommununar fyri 2005 til tílík endamál.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 30. juni 2005 og varð samtykt at beina málið til Hellunevndina til ummælis, hetta sambært § 37, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, um virksemi hjá staðbundnum ráðgevandi nevndum. Í hesi grein stendur, at henda skal tryggja fólki á staðnum ummælisrætt, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

Hetta er gjørt við skrivi kommununar til Hellunevndina, dagfest 04. juli 2005., hvar heitt verður á nevndina um at viðgerða málið og lata kommununi sítt ummæli í seinasta lagi 15. august 2005, so fyrispurningurin frá Justinus kann verða lagdur fyri býráðið til endaliga støðutakan á býráðsfundinum seinast í august 2005.

Kommunan hevur móttikið skriv frá Hellunevndini, dagfest 08. mars 2006, har nevndina á fundi sama dag hevur samtykt at svara býráðnum, at nevndin metir, at húsini eru varðveitingarverdug í tí standi, tey eru í ídag.

**Avgerð:**

Borgarstjórin tók avgerð um at taka málið av skránni.

**Mál nr. 16/2006.**

**Umsókn frá Eldrafelagnum Borgini um fíggjarligan stuðul fyri 2006 vm.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Eldrafelagnum Borgini, dagfest 27. februar 2006 um fíggjarligan stuðul fyri 2006 upp á kr. 60.000,00, sí annars skriv frá felagnum til kommununa, dagfest 15. september 2005.

Í svarskrivi frá mentamálanevndini til felagið, dagfest 01. november 2005 verður annars upplýst, at nevndin í sambandi við áheitanina frá 15. september 2005 hevur avgjørt ikki at gera broytingar, soleiðis at ein stuðulsjáttan fyri eldraøkið verður flutt til sosialu nevndina at umsita.

Ein av grundunum fyri hesi niðurstøðu var, at sosiala nevndin onga játtan hevði á fíggjarætlan kommununar fyri 2005 at veita Borgini stuðul til umsorganararbeiði, meðan mentamálanevndin hevði stuðulskonto nr. 450010 at ráða yvir til at veita feløgum vm. fíggjarligan stuðul eftir umsókn.

Í fíggjarætlan kommununar fyri 2006 eru broytingar farnar fram á soaiala økinum, soleiðis at skilja, at kommunan hevur avsett tilsamans kr. 490.000,00 til umsorganararbeiði merkt til Vesturstovu og Luffustovu, somuleiðis sum kommunan hevur søkt Almannastovuna um stuðul av tilsamans kr. 555.500,00, íroknað mattænastu. Hesi viðurskifti vórðu sera ógreið, tá kommunala fíggjarætlanin varð samtykt 29. november 2006, tá løgtingsfíggjarlógin ikki varð endaliga samtykt, og tí bant býráðið um heilan fingur við síni avseting.

Ì sambandi við avtalu millum kommunufeløgini og Fíggjarmálaráðið hava kommunurnar átikið sær eina samlaða játtan til umsorganararbeiði upp á tilsamans kr. 2,6 mió., og er henda upphædd kompenserað í lækking av landsskatti og hækking av kommunuskatti.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 15. mars 2006 og samtykti nevndin at mæla býráðnum til, at játtanarøkið "Umsorganararbeiði# verður flutt frá mentamálanevndini til sosialu nevndina, og at tað framyvir verður sosiala nevndin, sum kemur at viðgera umsóknir um m.a. játtan til umsorganararbeiðir, sum framd verða í kommununi uttan fyri kommunalar skipanir, sum ídag liggja undir málsøkinum hjá sosialu nevndini.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 17/2006.**

**Byggimál hjá Sp/f í Støð oman á kappróðrarneystinum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið nýggja umsókn frá SP/F Í Støð, dagfest 15.03. mars 2006 um byggiloyvi til handilsbygning omaná kappróðrarneystinum saman við tekningum..

Í veghæddini er ætlanin at hava 1 ella 2 handilshølir
2. hædd kann millum annað brúkast til 4 skrivstovuhølir
Loftshæddin kann millum annað brúkast til 2 stórar skrivstovur.
Samb. tekningina er bygningurin 3 m. longri enn verðandi neystagrund, og er spurningurin um hvussu gerast skal við undirlendið á teimum 3 metrunum.

Málið hevur verið fyri á fundi hjá Teknisku nevnd 23. mars 2006.

Jann Toftegaard greiddi frá, at Fa. Kato arbeiddi við ætlan um at byggja nýggjan bygning, Eyðun Peteren, arkitektur arbeiddi við hesum, og samb. hesum verður bygt fast í kappróðrarneystið.

Jann fór av fundinum tá hann hevði greitt frá teirra ætlan, og meðan umsóknin hjá Sp/f í Støð varð viðgjørd.

- Um Kato byggir fast í kappróðrarneystið, so kann miðstaðarøkið ikki verða samb. fyrilyggjandi uppskot um heildarætlan fyri økið.

Viðv. tekningini sum vísir, at bygningurin er 3 m. longri enn kapróðrarneystið, so mælir nevndin til at tað verður góðtikið, og at felagið ber allar útreiðslurnar. Arbeiðið má gerðast í samráð við teknisku deild.

Fyri at gagnnýta øki vestasnfyri, metur nevndin, at hesin veggur eigur av verða gjørdur sum eldsjóldrarveggur við ongum vindeyga, soleiðis at møguleiki er at byggja fast í kappróðrarneystið.

**Avgerð:**

Samtykt varð at beina málið aftur í teknisku nevndina til víðari viðgerðar, áðrenn eitt endaligt tilmæli um byggingar á økinum verða lagdar fyri býráðið til støðutakan. (9-0).

Meðan málið varð viðgjørt var Jann Toftegaard ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 18/2006.</u>**
**Viðvíkjandi nýggjum áskoðaraskýli oman fyri leikvøllin.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Teknistovuni v/Eyðuni Petersen, arkitekti, Torvgøta 1, 600 Saltangará, dagfest 01. september 2005 saman við kostnaðarmeting til skitsuprojekt av nýggjum áskoðaraskýli omanfyri leikvøllin í Fløtugerði.

Sambært metingini verður samlaði kostnaðurin íalt í roknað kommununar parti av meirvirðisgjaldinum kr. 6.115.000,00, men um verkætlanin verður sundurgreinað í tvey, verður mettur kostnaður av fyrsta byggistigi kr. 4.035.000,00 íroknað kommununar parti av meirvirðisgjaldinum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini 29. september 2005 og varð samtykt, at nevndin tekur undir við ætlanini um at fara undir gerð av áskoðaraskýli við vøllin, hetta sambært krøvum frá UEFA, men at projektið verður gjørt yvir t.d. 3 fíggjarár, har sitipláss til umleið 550 áskoðarar verða klár at taka í nýtslu til kappingarárið 2007.

Nevndin er av teirri sannføring, at rættasta loysnin er, at neyðug fundament verða gjørd beinanvegin til sjálvt skýlið, havandi í huga, at skýlið er ein partur av verkætlanini.

Í sambandi við endaligu góðkenningina av fíggjarætlan kommununar fyri 2006 tann 29. november 2005 eru avsettar kr. 2,4 mió. á konto 118030: "Áskoðaraskýli íløga", og tí hevur spurningurin tikið seg upp, um kommunan skal halda fast við fyriliggjandi projekt, sum liggur oman fyri kr. 6,0 mió. ella at gerast skal eitt projekt bert til 350 sitipláss, sum kravið er frá UEFA til dystir í Formuladeildini eftir 1. apríl 2007.

Tosað varð um møgulig onnur krøv frá UEFA eitt nú, at økið upp á 4 metrar í breidd skuldi verða kring allan vøllin. Í hesum sambandi metti nevndin, at kommunan ongan møguleika hevði fyri at vøllurin kundi lúka hesi krøv, og tí varð spurningurin, um vit ikki skuldu leggja á annan bógv við at hera nýtt stadion á Kambsdali á økinum millum Skótahúsið Kambur og Markná.

Í hesum sambandi skuli nevndin taka fund upp við grannakommunurnar um hesi viðurskifti, har greitt skuldi framganga, at hesar vórðu vælkomnar at luttaka í projektinum. Um kommunurnar ikki vilja luttaka, sí annars sáttmálar millum kommunurnar um "Ítróttar- og samkomuhøllina á Kambsdali", so ætlar Fuglafjarðar kommuna sjálv at byrja upp á arbeiðið.

Nevndin heldur verða rættast, at minimalur peningur verður nýttur í Fuglafirði, og at upphæddir verða avsettar komandi ár til stadion á Kambsdali. Um ikki allur peningurin í 2006 verður nýttur í Fløtugerði, so kann restupphæddin verða sett í grunn (á bók).

Pætur Joensen, býarverkfrøðingur varð á fundinum og vísti m.a. fram eitt uppskot um plaseran av stadion á oman fyri nevnda øki.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 15. mars 2006 og varð nevndin einmælt samd um at heita á býarverkfrøðingin um at gera eitt nýtt skorið projekt oman fyri leikvøllin, har hædd bert verður tikin til 350 áskoðarapláss, og skuldi hetta verða lagt aftur fyri nevndina, so skjótt sum hetta varð liðugt saman við eini kostnaðarmeting.

Fundur hevur aftur verið í mentamálanevndini tann 30. mars 2006, har nevndin sambært samtyktina frá 15. mars 2006 fekk eitt broytt uppskot frá Eyðuni Petersen og býarverkfrøðinginum, sum bert umfatar umleið 350 áskoðarapláss uttan skýli.

Mett verður, at broytta uppskotið kemur at kosta millum kr. 950.000,00 og kr. 1.000,000,00 íroknað kommunala partinum av meirvirðisgjaldinum, sum í løtuni er 6,25%.

Nevndin mælir einmælt býráðnum til at taka undir við broytta uppskotinum til bert at umfata áskoðarapláss til 350, og at upphæddin millum kostnaðin av broyttu íløguni og avsetingini av kr. 2,4 mió. á fíggjarætlan kommununar fyri 2006 verður sett á bók til nýtt stadion á Kambsdali.

**Avgerð:**

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.45

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Tórfríður Abrahamsen

Jón Nolsøe Olsen

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen